# UM NØKUR ÁR GRINDADRÁP

## Ikki Bara drepa

**Bjarni Mikkelsen, lívfrøðingur á Náttúrugripasavninum, heldur, at gera vit meiri burtur úr at granska grind, kann tað eisini geva okkum vælvild hjá umhvørvisfelagsskapum og útlendskum fjølmiðlum, sum annars vilja okkum ann í grindamálinum.**

**– Tað kann vísa umheiminum, at tað er altso ikki so, at vit bara drepa, vit granska eisini, sigur hann.**

**Hann heldur, at serliga í summar, nú umhvørvisfelagsskapir hava boðað frá, at teir koma higar, kundi tað givið okkum vælvild, at vit sluppu at merkja eina grind.**

**Hann vísir á, at summi hava borið upp á mál, at nú umhvørvisfelagsskapir koma higar í summar, skulu vit taka tað eitt sindur róliga við grindadrápi.**

**Á grindafundi á Oyrarbakka herfyri, helt hann fyri við einum skeivum smíli, at kanska fer hetta at geva teimum størri møguleika at fáa eina grind at merkja.**

**Í øllum førum heldur hann at vit eiga at kunna vísa umheiminum, at vit ikki bara drepa grind, men at vit eisini gera eitt vísindaligt arbeiðið fyri at varðveita og tryggja stovnin.**



**NEYÐUG GRANSKING**

*Granska vit grind og grindahval meiri, enn vit hava gjørt higartil, skulu vit gloyma alt um grindadráp um nøkur ár, sigur Bjarni Mikkelsen, lívfrøðingur. Teir hava bíðað í 11 ár eftir at sleppa at merkja grind. Her stendur hann við grindasendarum, sum teir hava havt liggjandi í fleiri ár og sum hann staðiliga vónar at sleppa at merkja eina grind við í summar*

**GRIND OG GRANSKING** Sleppa vit ikki at granska grind, kann eg siga við vissu, at grindadráp verður ólógligt um nøkur ár, sigur Bjarni Mikkelsen, lívfrøðingur

Áki Bertholdsen

- Vit mugu leggja størri dent á at granska grind og grindahval. Annars verður grindadráp skjótt forboðið.

Tað staðfestir Bjarni Mikkelsen, lívfrøðingur á Náttúrugripasavninum.

– Hetta er ikki nakað, eg haldi, hetta er nakað eg veit, leggur hann afturat.

Bjarni Mikkelsen hevur fingist nógv við grind og grindahval, men hann sigur, at skulu føroyingar gera sær vónir um at kunna halda fram at drepa grind, verða vit noytt at granska meiri.

– Tað hevur avgerandi týdning, at vit útvega okkum vitan um, hvussu nógvur grindahvalur er til. Tað er eisini neyðugt, at fáa greiði á, hvussu grindahvalur ferðast, hvussu víða hann ferðast og hvar hann heldur til.

– Og vit mugu eisini fáa greiði á um talan er um ein felags grindastovn, ella um grindin, vit drepa, bara er úr einum lokalum stovni.

### Forboðið

Bjarni Mikkelsen staðfestir, at megna vit ikki at leggja prógv á borðið um hesi viðurskifti, verða tað ikki bara umhvørvisfelagsskapir, sum verða eftir okkum

– Fáa vit ikki útvega okkum meiri og neyvari vísindaligt tilfar um grind og grindahval, verða tað sjálvt lond, sum Ísland, Noreg og